# Víðgongd framgongd

Alt fleiri sviar velja at styðja flokkin Sverigedemokraterne, sum serliga er kendur fyri síni víðgongdu sjónarmið í spurningum um fólk av fremmandum uppruna. Herfyri vísti ein meiningakanning, at 5,8 prosent av svensku veljarunum høvdu valt flokkin, um val var tá. Nú vísir ein nýggj kanning, at var ríkisdagsval í dag, hevði flokkurin fingið 7,2 prosent av atkvøðunum og 26 umboð í Ríkisdagin, skrivar tíðindastovan TT. Sverigedemokraterne hava ikki umboð í Ríkisdegnum, men alt bendir sostatt á, at flokkurin fær fleiri umboð har, tá val verður í september næsta ár.




# Játta skattasvik

Fleiri túsund amerikanarar hava nú viðgingið fyri amerikanska skattavaldinum, at teir hava fjalt pengar í øðrum londum fyri at sleppa undan skatti og harvið brotið landsins skattalóg. Amerikanska skattavaldið hevur lovað fólki linari revsing, um tey innan ein ávísan dag siga frá, hvat tey hava standandi í peningastovnum í øðrum londum, og næstan 15.000 hava tikið av tilboðnum, skrivar Reuters. Sagt verður, at hesi høvdu fjalt pengar í fleiri enn 70 londum og mest í Sveis og londum í Miðeystri. Sambært Reuters hevur amserikanska skattavaldið ongantíð fingið so nógvar upplýsingar um skattasvik.

# Nýtt føroyskt spæl á marknaðin

**Eitt nýtt føroyskt borðspæl er komið á marknaðin. Spælið eitur Orðálvur, og er eitt spæl við orðum til familjur og skúlar. – Óansæð hvussu væl tú dugir, lærir tú okkurt nýtt, lova Rannvá Skeel Johannsen og Kristianna Poulsen, sum hava ment spælið**

**SPÆL**
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í gjár kom eitt nýtt føroyskt borðspæl á marknaðin. Talan er um eitt familjuspæl, sum minnir eitt sindur um »Trivial Pursuit«, men sum er býtt í trý torleikastig.

Spælið eitur Orðálvur, og er tað einasta av sínum slagi, siga Rannvá Skeel Johannesen og Kristianna Poulsen, sum hava funnið uppá spælið.

- Spælið gongur út uppá at læra seg um navnorð, har øll sum vilja, kunnu læra seg um navnorð. Spælið er uppýtt í trý torleikastig, og til hvørt stigið fylgja spurningar um mállæru við. Men tá tú spælir, tá verða bara spurningar, sum verða spurndir, sigur Rannvá Skeel Johannsen.

- Spælið eitur Orðálvur, og hann er ein lítil føroyskur álvur, sum býr á oynni Orðoy, og tá vit spæla, eru vit gestir á hansara oyggj. Hann hevur gjørt ein veg allan vegin niðan á tindin, sum vit ferðast eftir, og á vegnum spyr hann okkum spurningar. Tá vit so eru komin niðan á tindin, áttu vit at dugað rættiliga nógv um navnorð, greiðir Kristianna Poulsen frá.



*Soleiðis sær nýggja spælið Orðálvur út. Spælið inniheldur umframt borðspælið, spurningar og svar, eisini vegleiðingar í mállæru*

## Byrjaði sum próvtøka

Hugskotið til spælið er eftirhondini gamalt. Rannvá og Kristianna gingu á Læraraskúla saman, og til próvtøkuna í 3.L royndu tær eitt líknandi hugskot, bara við sagnorðum.

- Árið eftir tað, gjørdu vit tað til høvuðsuppgávu hjá okkum í føroyskum á linju, og tá var tað um navnorð. Eftir tað fingu vit góðar afturmeldingar, og so fóru vit at hugsa um at geva tað út. Síðani er konseptið komið, alt við Orðálvi og oynni, tað er alt komið, meðan vit hava arbeitt við at tað skuldi gevast út, sigur Rannvá Juul Petersen.

Tær báðar hava arbeitt við spælinum í eini 3 til 4 ár, og í høvuðsheitum hevur tað verið í ferium og frítíðini, at tær hava arbeitt við spælinum.

## Børn og vaksin spæla samstundis

Spælið er bygt upp í stigum, soleiðis at øll kunnu vera við. Tað er eitt familjuspæl, og kunnu bæði vaksin og børn spæla í senn.

Men tað er einki krav, at tú skal duga nakað í mállæru, áðrenn tú kann spæla.

- Fyrsta stigið er somikið lætt, at tað duga vit oftani, uttan at duga at seta orð á alt, og so kann tú eisini spæla teg til eina rúgvu av lærdómi, greiðir Kristianna Poulsen frá.

Hetta spælið snýr seg bert um navnorð, og verður spælið væl móttikið, so verður arbeitt víðari við at gera eitt við sagnorðum, og so væntandi okkurt afturat, har hinir orðaflokkarnir verða umboðaðir.

Spælið vendur sær eisini til skúlar, og siga tær báðar, at spælið inniheldur alt tað, sum tær halda, at ein næmingur eigur at duga, tá hann fer úr fólkaskúlanum, og vóna tær, at skúlarnir taka væl ímóti tí.

- Men hetta er eisini eitt familjuspæl. Vit hugsaðu, at hví ikki fáa mállæruna út um skúlagátt, og gera hana til almenna vitan, sigur Kristianna Poulsen.

Til at tryggja, at spælið er rætt, hava tær fingið serkøn fólk í mállæru og føroyskum máli at hyggja ígjøgnum tilfarið, til tess at tryggja, at einki skeivt er í spælinum.

Kristianna Poulsen og Rannvá Skeel Petersen hava ment spælið, og eru tað Bókadeild Føroya Lærarafelags og Sprotin, sum geva spælið út. Spælið er stuðlað av MBM, Eik grunninum, Mentamálaráðnum og Mentanargrunni Landsins.

Spælið fæst, har spøl vanliga fáast, og tað kostar 498 krónur.

Í morgin klokkan 16 verður almenn framløga á Læraraskúlanum, har millum annað høvi verður at síggja, hvussu spælt verður við Orðálvi.

# Arbeiðsloysið heldur fram við at vaksa

**Aftur í oktober mánaði vaks arbeiðsloysið í Føroyum. Serliga er vøksturin í Suðuroy og Sandoy stórur, meðan Norðoyggjar framvegis hava størsta arbeiðsloysið**

**ARBEIÐSMARKNAÐUR**
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Føroyska arbeiðsloysið veksur framvegis. Í oktober varð arbeiðsloysið á føroyska arbeiðsmarknaðinum 4,4 prosent.

Hetta er ein vøkstur uppá 0,3 prosentstig síðan september. Árstíðarjavnaða arbeiðsloysið í september var 4,7 prosent.

714 mannfólk og 532 konufólk vóru fulltíðararbeiðsleys í oktober.

Sørsta arbeiðsloysið er í Norðoyggjum. Har er arbeiðsloysið líka undir 8 prosent. Arbeiðsloysið vaks í øllum sýslum í oktober, undantikið í Eysturoya og Vága Sýslu, har arbeiðsloysi stóð í stað. Størsti vøksturin var í Sandoy og Suðuroy. Har øktist talið av arbeiðsleysum við ávíkavíst heilum 20 og 19 prosentum frá september til oktober. Minsta arbeiðsloysið í oktober var í Eysturoy.

Uppgerðin hjá Hagstovu Føroya vísir eisini, at arbeiðsloysið er størst millum tey, ið eru 54 ár og eldri, og næststørst millum tey 25 til 34 ára gomlu, fylgd av teimum, sum eru 16 til 24 ár. Arbeiðsloysið vaks í øllum aldursbólkunum.

# Innflutningurin framvegis lítil

**Samlaði innflutningurin hjá føroyingum er enn sera lágur, samanborið við sama tíðarskeið í fjør. Samstundis er útflutningurin eisini minkaður eitt vet**

**INN- OG ÚTFLUTNINGUR**
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Føroyingar innflyta framvegis minni, enn vit gjørdu í fjør. Higartil í ár er innflutningurin hjá føroyingum 24 prosent minni, enn hann var sama tíðarskeið í fjør. Samstundis er útflutningurin minkaður fimm prosent.

Í innflutninginum er tað serliga akfør, sum nógv minni er av enn sama tíðarskeiðs í fjør. Í ár eru innflutt akfør fyri 69 milliónir krónur, meðan tað sama tíðarskeið í fjør varð innflutt fyri 222 milliónir krónur. Eisini er innflutningurin av brennievni nógv minkaður, úr 879 milliónum fyrstu 9 mánaðirnar 2008 til 488 milliónir fyrstu mánaðirnar 2009. Her skal tó havast í huga, at ein levering kann geva stórt útslag.

Byggivinnan er hart rakt, og hetta sæst eisini aftur. Innflutningurin av tilfari til byggivinnuna minkaði úr 443 milliónum krónum til 263 milliónir krónur, sum svarar til 41 prosent.

Hinvegin innfluttu vit fyri 273 milliónir í skipum og flogførum í ár, samanborið við 89 milliónir í fjør, og er hetta ein vøkstur upp á 208 prosent.

Uttan skip og flogfør er innflutningurin minkaður 29 prosent.

Útflutningurin er eisini minkaður. Serliga er tað útflutningurin av botnfiski, ið merkist væl. Hann minkaði við 19 prosentum, sum svarar til 215 milliónir krónur. Eisini útfluttu vit fyri 80 milliónir krónur minni í øðrum fiski og fiskaúrdráttum.

Hinvegin er útflutningurin av alifiski nógv vaksin, og fer upp um milliardina í ár. Har er útflutningurin vaksin úr 691 milliónum krónum fyrstu níggju mánaðirnar í fjør, til 979 milliónir krónur, sum svarar til ein vøkstur á 42 prosent, og ger hetta, at samlaði útflutningurin bert er minkaður við fimm prosentum.